# 7 mánaðir fyri 3 kilo av hassji



*Ein 29 ára gamal íslendingur varð mánadagin dømdur at sita sjey mánaðir í fongsli fyri at hava smuglað 2,9 kilo av hassji til Føroyar.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Ein íslendingur varð mánadagin dømdur at sita sjey mánaðir í fongsli fyri at hava smuglað 2,9 kilo av hassji til Føroyar. Hann er harumframt vístur av landinum og hevur innferðarbann í fimm ár. Ákæruvaldið fer at kæra dómin, tí revsingin er ov lin**

SMUGLING
*Stefan í Skorini*

Mánadagin seinnapartin kom ein íslendari, ið er 29 ára gamal, fyri Føroya Rætt. Hann var í fyrsta lagi ákærdur fyri at hava smuglað umleið trý kilo av hassji til Føroyar við Atlantic Airways fríggjadagin 31. januar.

Løgreglan í Keypmannahavn hevur eisini tikið mannin við smáum nøgdum av rúsevnum á sær í oktober í fjør,og hesar ákærur vórðu eisini viðgjørdar. Talan var um eini 10 gramm av amfetamini, 80 gramm av hassji og ein hálvan bolla av ecstacy.

Ákærin kravdi, at revsingin ikki var minni enn eitt ára fongsul, men dómarin gav bara sjey mánaðir, sum verjin mælti til. Ákæruvaldið fer nú at kæra dómin til Eystara Landsrætt, tí tað metir ikki, at dómurin er nøktandi.

Maðurin varð eisini dømdur at rinda sakarmálskostnaðin. Løgreglan í Keypmannahavn legði hald á 7.000 krónur, sum lógu í madrassuni í bústaðinum hjá manninum, og hesin peningur verður latin fyri sakarmálskostnað.

### Í stórari skuld

Maðurin greiddi frá í rættinum, at hann var komin í stóra skuld til sín fasta veitara av rúsevnum í Christiania í Keypmannahavn. Um hann tó hevði trý kilo av hassji við sær til Íslands, skuldi skuldin strikast.

Orsøkin til skuldina var hon, at hann hevði roynt at smugla eitt kilo av marihuana til Noregs fyri henda veitaran, men hann varð tikin av norsku løgregluni á sumri í fjør. Tí var hann komin at skylda 25.000 krónur, sum hann ikki kláraði at rinda aftur. Ein annar møguleiki var tó at veita aðrar tænastur sum t.d. at smugla. Hann vildi tó ikki siga í rættinum, hvør hesin veitarin er.

Ákæruvaldið heldur, at tá maðurin tríggjar ferðir er tikin fyri brot á rúsevnislógina innanfyri eitt ár, eigur hann at verða dømdur harðari. Tí verður dómurin kærdur.

Maðurin segði, at hann hevði mistikið seg við ferðaætlanini hjá Atlantic Airways og Icelandair. Ætlanin hjá honum var at fara beinleiðis víðari til Íslands, eftir at hann hevði lent í Føroyum, men flogfarið var longu farið. Tí ætlaði hann sær til Havnar, men hann varð tikin av tollvaldinum.

Maðurin lovaði bót og bata í framtíðini. Hann ætlaði sær aftur til Íslands at arbeiða og forvinna eitt sindur av peningi fyri síðani at rinda skuldina aftur.

Hann verður væntandi fluttur til Danmarkar at sita dómin.

Tann fyrsti er dømdur:

# 15 mánaðir í fongsul

**Ein 33 ára gamal maður úr Havn varð mánadagin dømdur 1 ár og 3 mánaðir treytaleysa fongsulsrevsing fyri at hava selt 8 kilo av hassji í einum tvey ára tíðarskeiði**

RÚSEVNI
*Stefan í Skorini*

Maðurin viðgekk í rættinum, at hann hevði keypt átta kilo av hassji, og av teimum hevði hann selt sjey kilo víðari. Sambært honum sjálvum var eitt hálvt kilo til egið brúk, og løgreglan fann eitt hálvt kilo í bústaðinum hjá manninum.

Dómarin gjørdi av, at hald skal leggjast á 167.000 krónur, sum er vinningur av søluni. Ákæruvaldið kravdi upprunaliga 460.000 krónur, men dómarin minkaði hesa upphædd eftir frágreiðingina hjá ákærda manninum. Ákæruvaldið vildi eisini vera við, at maðurin hevði havt tíggju kilo um hendi og ikki átta.

Maðurin varð dømdur eftir lógini um euforiserandi evni, tí nøgdin var minni enn tíggju kilo. Um nøgdin var meira hevði revsilógin verið nýtt, tí talan er um tyngjandi umstøður.

Hald skal eisini leggjast á 482 gramm av hassji og 7.890 krónur, sum løgreglan fann í bústaðinum hjá manninum. Harumframt skulu ymsir lutir, sum nýttir verða at njóta og selja hassj við, konfiskerast.

Málið var eitt ájáttanarmál, og tað vil siga, at maðurin játtaði seg sekan í teimum flestu ákærunum, og at dómarin síðani skuldi áseta eina revsing eftir frágreiðingini hjá ákærda.

### Leyslatin

Í ákæruritinum varð hildið uppá, at maðurin hevði keypt hassjið frá sama manni og latið hesum ein part av vinninginum. Rættarmálið var fyri afturlatnum hurðum við atliti til kanningar í øðrum líknandi málum, og tí ber ikki til at fáa innlit í smálutirnar.

Ákærin kravdi, at maðurin verður varðhaldsfongslaður, til hann skal sita dómin, men dómarin metti, at tann dømdi kundi latast leysur. Hesa avgerð kærdi ákærin til Landsrættin, sum skal taka støðu, áðrenn maðurin verður leyslatin.

Revsikarmurin fyri slík lógarbrot er nógv strangari í Føroyum enn í Danmark. Orsøkin til hetta er, at vinningurin av rúsevnasølu er nógv hægri her enn í Danmark, og tí at Føroyar er eitt lítið samfelag, har slíkt virksemi fær álvarsamari avleiðingar.

Tann 33 ára gamli maðurin er tann fyrsti, sum verður dømdur, í tí stóra narkotikamálinum, sum gjørdist kent tann 16. januar, tá løgreglan tók níggju menn í Føroyum eftir umfatandi húsarannsóknir.

Enn er ikki greitt, hvar maðurin fer at sita dómin.

Ein 29 ára gamal maður, sum eisini varð tikin 16. januar, kemur væntandi fyri rættin hósdagin.

Jógvan Lützen:

# Stuðlar Fólkaflokkinum

**Tíðindi hava seinastu tíðina gingið um, at Jógvan Lützen, fyrrverandi býráðslimur í Klaksvík, hevur í hyggju at stilla upp fyri Sjálvstýrisflokkin. Jógvan noktar fyri, at nakað hald er í hesum tíðindum. Hann stuðlar lista A til komandi løgtingsval**

LØGTINGSVAL
*Stefan í Skorini*

– Eg havi sjálvur hoyrt hasi tíðindini, og eg havi fingið fleiri uppringingar frá fólki, ið hava spurt meg um hasi leysatíðindini, men einki hald er í teimum, sigur Jógvan Lützen, tá hann verður spurdur, um hann ætlar at stilla upp fyri Sjálvstýrisflokkin til løgtingsvaldið.

Hann sigur, at eingin úr Sjálvstýrisflokkinum hevur vent sær til hansara um at gerast valevni á lista D. Um hann hinvegin hevði fingið eina áheita um hetta, hevði hann ikki ønt henni aftur.

– Eg eri fólkafloksmaður um ein háls, og eg fari at stuðla flokkinum til valið, sigur Jógvan Lützen.

Fólkaflokkurin hevur stillað seks valevni upp til valið í Norðoyggjum. Tó boðaði flokkurin frá, at hann fegin vildi hava enn eitt valevni á listan.

Jógvan Lützen sigur seg heldur vilja loyva yngri fólki framat listanum, men um hann fekk eina áheitan um at stilla upp, hevði hann umhugsað hetta tilboðið.



# Finnbogi Arge gevst í politikki

**Tólv ár sum politikari – bæði sum landsstýris- og løgtingsmaður – vóru nóg mikið fyri Finnboga Arge, sum nú gevst í politikki. –Eg fari aftur í vinnuna, og so fari eg eisini at renna eitt maraton, sigur Finnbogi**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Finnbogi Arge hevur boðað sínum floksfeløgum frá, at hann ikki stillar upp til løgtingsvalið. Hann ætlar sær fullkomiliga at gevast við at vera politikari, og hann verður sostatt ikki uppstillaður til hetta ella onnur komandi løgtingsval.

– Eg haldi, at tað má vera annað í lívinum enn politikkur. Eg havi verið við í politikki í tólv ár nú, og hetta má vera nóg mikið. Lívið er jú so stutt, sigur Finnbogi Arge flennandi.

Yrkisleiðin hjá Finnboga Arge í politikki byrjaði í 1990, tá hann varð valdur á ting fyri Sambandsflokkin. Hann varð valdur innaftur á ting við valið í 1994. Í 1996 kom vátt í reiðrið millum hann og Sambandsflokkin, og hann gjørdist uttanflokka tingmaður í tvey ár. Við seinasta løgtingsval í 1998 stillaði hann aftur upp, men hesaferð var tað fyri Fólkaflokkin. Hann fekk 185 atkvøður, og gjørdist hann nummar trý á listanum hjá Fólkaflokkinum. Hetta rakk ikki til ein sess í tinginum, men boð vóru eftir Finnboga at koma út Landsstýrið at vera í landsstýrismann í m.a. vinnumálum. Hetta starv røkti hann til 27. august 2000, tá hann gavst í starvinum, og Bjarni Djurholm loysti hann av. Afturfyri loysti Finnbogi Bjarna av sum tingmann, og Finnbogi gjørdist eisini formaður í fíggjarnevndini. Hann hevur verið kendur fyri síni vinnuligu sjónarmið, og tað er eisini hetta sama evnið, ið fer at upptaka hann í framtíðini.

– Eg havi eitt virki at passa, og tað var eisini tí, at eg fór úr landsstýrinum. Eg fari aftur í vinnuna fulltíð, har eg havi verið áður, og hetta trúgvi eg fer at vera spennandi at koma aftur til, sigur Finnbogi Arge.

Avgerðin um at gevast er tikin fyri langari tíð síðani.

– Eg tók avgerðina longu, tá ið eg fór frá sum landsstýrismaður. Eg havi síðani fingið áheitanir um at stilla upp, men eg havi greitt boðað frá, at eg fari úr politikki, sigur Finnbogi.

Hann heldur, at gongdin hjá Fólkaflokkinum í sjálvstýristilgongdini er á snórabeinari leið, sum hann tekur til. Víðari sigur hann, at tað hevði verið ynskiligt, um tað verður tikið eitt sindur meira róligt tað næstu tíðina, áðrenn tú hevur prógvað, at tað ber til at minka blokkin, men hann tekur kortini undir við, at blokkurin varð minkaður.

– Eg eri framvegis áhugaður í politikki, og eg eri eisini sera glaður fyri tíðina, men eg ætli mær at gevast sum politikari. Eg fari nokk at stuðla flokkinum víðari sum stillari ella okkurt annað, sigur Finnbogi Arge.

Næsta takið hjá Finnboga verður at renna Maraton í Berlin. Finnbogi og beiggi hansara venja nú av øllum alvi til kappingina. Maraton renningin í Berlin, ið er ein av stóru Maraton renningunum í heiminum, verður 29 september, og Finnbogi sigur, at hann er við at koma í form. Hann hevur longu runnið tað, ið svara til eitt hálvt marathon, men hann ætlar sær eisini at uppliva tað “ultimativa”, at renna teir 42,195 km, ið er teinurin ein maratonrennari noyðist at berjast við. Finnbogi sigur seg hava góðar vónir at klára allan teinin í Berlin, nú tann politiski teinurin er runnin.




*Finnbogi Arge hevur seinastu tólv árini sitið á tingi ella verið landsstýrismaður. Nú er liðugt við tí, og hann fer heldur at hugsa um sína bilasølu. Eisini skal hann til Berlin at renna maraton í september.*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*

# Tryggingarnar merkja 11. september

**Bæði Tryggingarfelagið Føroya og Trygd hava merkt árinini av yvirgangsatsóknunum 11. september upp á egnan kropp**

TRYGGING
*Heri á Rógvi*

Tá høghúsini í New York rapaðu hin 11. september síðsta ár, fyri góðum fimm mánaðunum síðani, so merkti hetta eisini eitt skrædl í tryggingarheiminum. Stóru og umfatandi skaðarnir settu síni tungu spor hjá rættiliga nógvum tryggingarfeløgum. Harðast gekk tað útyvir eftirtryggingarfyritøkurnar, sum veruliga hava merkt, hvat tað hevur at siga, tá yvirgangsmenn gera um seg.

### Eyka útreiðslur

Í ársroknskapinum hjá Trygd, sum kom út fyri kortum, stendur ein serligur partur eftirtryggingar ella Reassurance. Tað er nevniliga soleiðis, at ein góður partur av teimum tryggingum, ið eru teknaðar hjá einum tryggingarfelag verða eftirtryggjaðar í einum størri eftirtryggingarfelag.

Í ársroknskapinum hjá Trygd stendur at lesa, at reassurence er altjóða samanset, og prísurin fyri hetta verður ávirkaður av tí einkulta felagnum, eins og allar tryggingarútreiðslur kring heimin ávirka prísin, ið tryggingarfeløgini skulu gjalda tí størra eftirtryggingarfelagnum.

– Tær ovurhondsstóru endurgjaldsútreiðslurnar, sum vórðu goldnar í sambandi við yvirgangsatsóknirnar í Sambandsríkinum tann 11. september 2001 saman við fleiri ár við vantandi vinningi hjá eftirtryggingarfeløgunum hevur viðført, at gjaldið fyri eftirtrygging er globalt er fari munandi upp. Sostatt eru tey eftirtryggingargjøld, ið Trygd skal gjalda í 2002, farin munandi upp eisini. Hetta vil upp á longri sigt væntast at viðføra hægri tryggingargjøld, skrivar Trygd í ársfrágreiðingini, har tað verður sagt til endans, at felagið framvegis er sikrað við skilagóðari og solidari eftirtrygging.

### Royna at halda

Hjá Tryggingarfelagnum Føroyar er sama skilið. Gunnar í Liða, forstjóri, sigur, at teir, eins og onnur, hava merkt, at tað er vorðið munandi dýrari at verða eftirtryggjaður.

– Hetta vil í fyrstu atløgu ikki ávirka okkara tryggingartakarar, sigur Gunnar í Liða. Hann greiðir frá, at teir hava fingið skrúvað tað soleiðis saman, at tryggingartakararnir ikki fara at merkja nakað til hetta – í øllum førum í fyrstu umgangi.

Tað er tó ilt at spáa um, hvussu tað verður í framtíðini.

–Eftirtryggingarfyritøkurnar hava nú fingið eitt faktor afturat í yvirgangsatsóknum, og hetta kann lættliga hugsast at gerast dýrt, sigur Gunnar í Liða.

Enn hava føroysku tryggingartakararnir ikki merkt nakað til 11. september, men tað væl hugsast, at hetta kemur at vera ein dagur, ið tryggingartakarin eisini kemur at merkja á pengapunginum.



*Ógvusligt var tað, tá yvirgangsmenn javnaðu Twin Towers við jørðina. Eftirtryggingarfeløgini máttu gjalda fyri gildið, og tað væl hugsast, at hetta nú eisini fer at merkjast í Føroyum.*